miðvikan
Nr. 130 • 09. juli 2008
Siðsøguligt tilfar
í Sosialinum mikudagar

# Grannalagið hjá Tróndi í Gøtu

**Vit halda fram at greiða frá grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu. Fyrst heldur Tórir Thomsen fram við at greiða frá lívinum í Blásastovu og fólkinum har. Síðan verður greitt frá húsunum hjá Glyvra Hanusi, sum eisini umboðar gøtusøgu fyrst í undanfarnu øld. Fyrst meira um Blásastovu**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**2. partur**

**Biddarar**

Eg minnist eisini, tá ið fólk plagdu at koma til bygdina at bidda.

Tey gingu hús úr húsi, har tað kundi roknast við at fáa nakað. Serliga minnast fólk tvær kvinnur, sum komu eina ferð árliga. Tað varð fortalt, at Hans Elias í Pállstovu eina ferð hoyrdi aðra siga við hina, tá ið tær fara avstað aftur: "Illa royndist Norðragøta í ár!" Sagt varð, at tær heldur vildu hava ull enn pylsu, tí ull var lættari at bera. Sigast kann, at hetta var ein partur av sosialu forsorgini tá í tíðini, sum Blásastova eisini var partur av.



*F.v. Tórir, Petur Jakku, pápin, og Jákup, beiggin*

## Elias bóndi fekk eina prinsessu í ættina

Í Blásastovu komu eisini nógv fólk, og var eisini talan um avbygdafólk í ymiskum ørindum. Ein av teimum, sum regluliga kom, var Elias bóndi, sum hann var kallaður. Pápi plagdi at siga, at tað vóru stuttligir dagar, tá ið Elias kom. Hann hevði harmoniku heima og dugdi væl at spæla uppá.

Tað hevði eina ferð verið eitt stórt brúðleyp í Gøtu, og dagin eftir vóru allir hesir gomlu menninir samlaðir í Blásastovu, har tey áttu harmoniku. Elias fór at spæla uppá hana. Hesir gomlu dansaðu villir á gólvinum. Elias segði, at "hevði eg havt mína egnu harmoniku, so skuldu tit sæð!"



*Elias bóndi, føddur 1844*

Elias plagdi at koma at rógva út við Blásastovubátinum. Hann róði vist eisini norð á hav við áttamannafarinum Broje, sum tey í Blásastovu áttu part í. Teir róðu út higani frá Gøtu, so tað hevur verið langt á fiskileið.

Eg minnist eitt hús, sum kallaðist Fiskahúsið, sum gamli Sámal Jakku átti. Eg haldi, at teir býttu fiskin millum sín og flaktu sín part hvør sær.

Elias kom av Selatrað, men í veruleikanum var hann av Trøllanesi og varð giftur til eitt festi á Selatrað. Fyrra kona hansara doyði, og hann giftist aftur við Elin Guldbrandsø av Skælingi.

Á Trøllanesi hevði hann verið við í einum tí fyrsta stigi at royna skipsfiskiskap í Føroyum, nevnuliga keypið av Caprice í 1865. Skipari gjørdist hálvbeiggi hansara Jóhannes. Fiskiskapurin miseydnaðist, og skipið við skipara endaði í Skotlandi.

Ein orsøk til, at Elias kom so nógv til Gøtu kundi vera, at her átti hann skyldfólk. Pápi hansara Joen Johannesen, kallaður Fuglfjarða Jógvan, var beiggi Ole Johannesen, sum var abbi Óla Gregersen í Syðrugøtu.

Mamma Fuglfjarða Jógvan og Óla Johannesen var Anna Olesdatter, sum var dóttir Ole Jacobsen f. 1714, bónda í Tjørnustovu, sum er eitt grannahús til Blásastovu. Mamman var Barbara Simonsdatter av Blankaskála.

Abbi ommu, Elspu Katrinu, sum æt Jákup eins og pápi hennara, var eisini úr Tjørnustovu. Tískil hava tey í Blásastovu verið nærmastu skyldfólk hjá Eliasi.

Tað pussiga er, at nógv seinni í tíðini giftist abbadóttir Elias, Elisa, uppkallað eftir abbanum, inn í Tjørnustovu sum bóndakona. Ein annar abbasonur kom eisini í grannalagið. Hetta var Niels Joensen, sonur Jóan Petur hjá Eliasi í fyrru giftu. Hann giftist við Stinulenu Olsen, ættað úr Tjørnuvík, men búsitandi í Norðragøtu. Hon kom at vera hjá systir síni Marsannu, sum var gift við Sámal Hansen, sum var á kirkjumyndini í fyrsta partinum av hesi røð.



*Tummas bóndi í Blásastovu*

Elias hevði eitt annað óbeinleiðis samband við Tjørnustovu. Seinni verfaðir hansara, Andrass á Vattóli, var úr Skúvoy. Hann var forliptur í bóndadótrina Marjun niðri í Stovu. Andrass átti onga jørð og var tí óynkstur sum versonur. Fyri at forpurra hesum sendu foreldrini Marjun við eini arbeiðsgentu norð í Tjørnustovu. Hetta riggaði væl. Tað rann saman millum hana og elsta sonin Óla Jákup. Tey fluttu til Skúvoyar og aftaná tey fóru fýra systkin sama veg.

Andrass endaði so á Skælingi, har hann giftist við eini einkju og fekk tvíburar saman við henni. Onnur teirra æt Elin og giftist við Elias.

Her kann nevnast til stuttleika, at Elias gjørdist verlangabbi til eina prinsessu. Ein sonur hansara við seinni giftu var Niels Juel. Hann var við til at keypa Golden Harp til Føroya fyrst í hini øldini. Hetta skip hevur alt tað, fólk minnast, ligið sum vrak út fyri Hvalvík. Abbasonur Niels Juel, Thorben, giftist í 1963 við systkinabarn verandi kongin í Thailandi. Tey fóru tó seinni frá hvørjum øðrum.

## Handil og skip

Tað var Óla Jákup á Bakkanum, sum byrjaði fyrsta handil í Norðragøtu. Hann var pápabeiggi Hans Petur bónda og doyði í 1889. Óla Jákup fekk handilsbræv í 1881, bygdi sær sethús og handil í 1881/82. Hann fór at handla fyri Jørgen Bech & Sønner í Klaksvík. Tað gekk tó illa við handlinum og hann gavst longu í 1887. Vit koma aftur til hann.

Jákup í Frammistovu handlaði aftaná Óla Jákup. Tey búðu í handlinum, har tað var íbúð við stovu, køki og kamar. Hann doyði í 1903.

Síðan var tað abbi í Syðrugøtu, Lutherus Christiansen, sum tók við handlinum. Hann doyði tó ungur.

Tað hevur vist verið umleið í 1910, at Tummas Jakku, pápabeiggi, fór at handla og eisini at keypa fisk. Fólk, sum eg fyrst minnist at hava verið í handlinum vóru Jacobina g. Heinesen og Hans Elias í Pállstovu. Hann var kúlutur og ikki væl fyri til